Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	30.09.2025
Mál nr.:	25/20102
Málsviðgjørt:	JS, DH, JEK og BAB
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	18.09.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning
(Hægri avgjøld á tubbak og snús – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 30. apríl 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrinum 2402.10.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 175,00 kr." til: "100 stk. 200,00 kr."

2. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2402.20.10 til 2402.90.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 145,00 kr." til: "100 stk. 175,00 kr."

3. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.11.00 til 2403.91.00 í 3. teigi broytt frá "215,00 kr. pr. kg." til: "280,00 kr. pr. kg."

4. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.99.20 til 2403.99.90 í 3. teigi broytt frá "144,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg."

5. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2404.11.00 til 2404.19.90 í 3. teigi broytt frá "215,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg."

6. Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður aftan á vørunummar 2404.12.00 sum nýtt vørunummar sett: "2404.19.10", "0", "2.000 kr. pr. kg.", "Sum hevur í sær tubbakerstatning".

§ 2

Gildiskoma og virknaður

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá framløgudegnum.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Nógv – eisini ung fólk – snúsa. Gransking vísir, at støðugt fleiri heilsuskaðar, undir hesum varandi heilsuskaðar, kunnu standast av at snúsa.

Í samgonguskjalinum stendur, at "Átøkini fyri betri fólkaheilsu verða styrkt" og at "Átøk í krabbameinsætlanini skulu fremjast".

Kanningar vísa, at tað ber til at røkka munadyggum úrslitum, um fleiri amboð verða nýtt samstundis. Virknastu amboðini, tá tað snýr seg um at ávirka nýtslu og forða fyri heilsuskaðiligari ovurnýtslu í einum samfelagi, eru atkoma og prísir.

Í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar (2022, tilmæli nr. 7) verður mælt til, at "prísurin á tubbaksvørum støðugt verður hækkaður."

Um prísurin á tubbaksvørum og nikotinvørum hækkar munandi, ber bæði til:

- at forða fyri at børn og ung byrja at brúka hesar vørur, og harvið røkka málinum um, at børn, sum eru fødd í 2015 ella seinni, verða tubbaksfrí og nikotinfrí,
- at tálma tubbaksnýtslu og nikotinnýtslu sum heild,
- at minka um sosiala ójavnan í heilsustøðu hjá fólki.

Seinnu árini eru tiltøk sett í verk, sum hava til endamáls at minka um royking, men eingi tiltøk eru sett í verk til tess at minka um snúsnýtslu.

Sambært kanning, sum Heilsustýrið gjørdi í 2023, siga 29% av monnunum í aldrinum 18–24 ár og 19% í aldrinum 25–34 ár, at teir snúsa dagliga. 17% av kvinnunum í aldrinum 18–24 ár siga, at tær snúsa dagliga. Nikotin er sera vanaelvandi, og tí er vandi fyri, at tey, sum eru byrjað at snúsa, halda fram við tí.

Av tí at ein so stórur partur av ungum fólki snúsar, er umráðandi at forða fyri, at børn og ung byrja at snúsa ella brúka aðrar tubbaksvørur og nikotinvørur.

Við ætlaðu hækkingini í avgjøldum á tubbak og snús verður tilmæli 7 í Krabbameinsætlanini 2022 framt, eins og átak verður gjørt at fremja fólkaheilsuna, soleiðis sum samgongan hevur sett sær fyri.

1.2. Galdandi lóggáva
Í dag er avgjaldið fyri hvørja sigarett 1,45 kr. Avgjaldið á roykitubbak er 215 kr. fyri kilo og avgjaldið á snús er 144 kr. fyri kilo.

1.3. Endamálið við uppskotinum
At hækka avgjøldini á snús og tubbak.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Avgjøldini á tubbak og snús verða hækkað.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Landið hevur í dag eina inntøku á umleið 45 mió. kr. í punktgjøldum frá snúsi og tubbaki. Mett verður, at inntøkan hjá landinum verður 28 mió. kr. hægri við ætlaðu hækkingini í avgjøldunum. Tað er við teirri fortreyt, at nýtslan er óbroytt. Verður roknað við eini lækking í nýtsluni á 10% fyrsta árið, verður inntøkan frá hægri avgjøldum á leið 20 mió. kr og er partur av FLU 2026.

Talva 1. Avgjald á tubbak og snús

	Avgjald per stk ella kilo	Nýtt avgjald	Uppskotið
Sigarir (stk)	1,75 kr.	2,00 kr.	§ 1, 1. pkt.
Sigarettir (stk)	1,45 kr.	1,75 kr.	§ 1, 2. pkt.
Roykitubbak (kilo)	215 kr.	280 kr.	§ 1, 3. pkt.
Snús (kilo)	144 kr.	2.000 kr.	§ 1, 4. pkt.
Onnur vøra (kilo)	215 kr.	2.000 kr.	§ 1, 5. pkt.
Tubbakerstatning (nýtt)	0 kr.	2.000 kr.	§ 1, 6. pkt.

Talva 2. Meting av inntøku, um avgjaldið verður broytt.

	Mongd	Inntøka	Nýggj inntøka	Inntøka við nýtslu lækking
Sigarir	54.000 stk.	94.500 kr.	108.000 kr.	97.200 kr.
Sigarettir	28.700.000 stk.	41.615.000 kr.	50.225.000 kr.	45.202.500 kr.
Roykitubbak	9.100 kilo	1.956.500 kr.	2.548.000 kr.	2.293.200 kr.
Snús	10.000 kilo	1.440.000 kr.	20.000.000 kr.	18.000.000 kr.
Samanlagt		45.106.000 kr.	72.881.000 kr.	65.592.900 kr.
Meirinntøka			**27.775.000 kr.**	**20.486.900 kr.**

Nota: vørunummar 2404.11.00 til 2404.19.90 (onnur vøra) eru sett inn 1. juni 2025, og tí eru tøl ikki tøk fyri henda vørubólk enn.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Uppskotið hevur ikki aðrar fíggjarligar avleiðingar enn, at roknast kann við minni sølu av tubbaki og snúsi.

2.4.Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Tað fer at kosta meira at roykja og at brúka snús. Avgjaldið fer at tyngja meira hjá lágløntum, eins og øll avgjøld á innflutning og framleiðslu á nýtsluvørur.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15.september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Tað er ongar kendar markaforðingar á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið leggur hægri avgjald á tubbak og snús.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýriskvinnuna, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1 verður ásett, hvørji punktavgjøld verða broytt fyri viðkomandi vørunummar í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1.

Samstundis verður eitt nýtt vørunummar sett í kapitli 24 í frumskjal 1 í skjali 1 aftan á vørunummar 2404.12.00 sum nýtt vørunummar sett: 2404.19.10, sum hevur í sær tubbakerstatning. Hetta vørunummar fær eins 2404.19.90 eitt avgjald á 2.000,00 kr. pr. kg.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur